# Byggisamtykt fyri Kirkjubø

## Ásetingar - áðrenn og aftaná broyting

| **Áðrenn broying**<br>**B - Sethús** | **Eftir broyting**<br>**A - Búðstaðarøki** |
|---|---|
| Loyvt er einans at byggja sethús við upp til 2 íbúðum og - eftir serloyvi frá byggivaldinum - tvíhús, rað- og ketuhús o.t. Til eitt húski. Í sambandi við bústaðirnar skal tó bera til at innrætta høli til handlar, onnur vinnuendamál og stovnar, treytað av at hesi virki ikki eru til ampa ella lýta dámin á økinum sum sethúsabýlingi. | Umráðisparturin verður lagdur til stakhús. Eftir serloyvi frá byggivaldinum kunnu eisini byggjast tvíhús. Stakhús og tvíhús kunnu eisini hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð.<br><br>Í sambandi við bústaðarøki kann byggivaldið geva serloyvi til annað virksemi sum handlar, smærri vinnuvirki og stovnar, ið natúrliga hoyra býlinginum til, treytað av, at hetta ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum sum sethúsabýlingur og sum lúka treytirnar í flokking av vinnuvirkjum í Tórshavnar kommunu. |
| | Virkini skulu kunna flokkast í umhvørvisflokki 1-2 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu |
| Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 400 m2 til støddar. Tá ið bygging verður framd eftir byggiskipan, sum bygdaráðið hevur góðkent og tryggjað ella eftir serstakari byggisamtykt, kann bygdaráðið loyva, at grundstykkini eru minni enn 400 m2, tó í minsta lagi 320 m2 fyri sethús og 2602 fyri hvønn partin av einum tvíhúsum, ketu- ella raðhúsum. Ein partur av teirri ásettu minstuvídd kann verða lagdur burturav sum felags tilhalds- og bilstøðlaøki. | Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 400 m2 fyri stakhús og 300 m2 fyri hvønn partin av einum tvíhúsum. |
| | Útstykking verður einans loyvd sambært útstykkingarætlan fyri eitt natúrligt avmarkað øki. |
| | Byggistigið skal ikki fara upp um 0,3 |
| Nettonýtingarstigið má ikki fara upp um 0,3 fyri einhúskishús og 0,4 fyri tvíhús, ketu- ella raðhús. | Nýtslustigið skal ikki fara upp um 0,6 fyri stakhús og 0,7 fyri tvíhús. |
| Hús mugu einans verða bygd í einari hædd við nýttum lofti og mugu ikki vera hægri enn 5 m til yvirgrind og 0,8 til mønuna, mált frá meðaljørðildi. Kjallaraloftið má ikki vera meira enn 1,0 m oman fyri hægsta jørðildi við húsahorn. Er hæddarmunurin á lendinum, roknað sum munurin millum hægsta og lægsta jørðildi, minni enn 1,5 m er tó loyvt at leggja hjallarloftið upp til 2,5 moman fyri lægsta jørðildi við húsahorn. Bert ein kjallari má vera. Har bygging er fram við vegi kunnu vegmyndugleikarnir áseta hæddina á kjallaraloftinum í mun til veghæddina. | Hús skulu ikki verða bygd við meira enn tveimum hæddum umframt nýttum lofti. Kjallari verður roknaður sum húsahædd. |
| Í serstakari byggisamtykt er ikki loyvt at fara upp um tey nýtingarstig, ið nevnd eru í stk. 3, tá økið verður roknað sum heild. | Hús við vanligari mønureising skulu ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt við útvegg og 9 m til mønuna. |
| Loyvt verður at umvæla verandi sethús og byggja aftur at teimum, t.d. Durur, baðirúm o.t., so tey eru hóskilig til nútímans nýtslu sum sethús. | Verða hús bygd við einvegis takhalli ella sløttum takið, skal tann lægra síðan ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt við útvegg og tann hægra síðan ikki vera hægri enn 7,5 m til hægsta punkt við útvegg. |

# Byggisamtykt fyri Kirkjubø

## Ásetingar - áðrenn og aftaná broyting

| **Áðrenn broyting**<br>**D - Havnaøki** | **Áðrenn broyting**<br>**D1 - Ferjuhavn** | **Eftir broyting**<br>**B1 - Harvnaøki** |
|---|---|---|
| Øki verður lagt av til havnaendamál (herundir eisini bátahavnir) og virki, ið hava samband við skipaferðslu og fiskivinnu og til virksemi, ið hevur samband við tey, bilstøðlar o.t. | Øki verður lagt av til ferjuhavn og virki, ið hava samband við farma- og ferðafólkaflutning, og til virksemi, ið hevur samband við tey, bilstøðlar, frásetingarpláss o.t. | Umráðisparturin verður lagdur til endamál, ið hava við havnarakstur, skipaferðslu, samferðslu og fiskivinnu at gera og til tænastuvirskemi, ið hevur samband við hesi. |
| | Bygging kann verða loyvd eftir byggiætlan fyri eitt náttúrliga avmarkað øki, sum er góðkent av bygdaráðnum og Landsverkfrøðinginum. | |
| Byggingarstigið fyri havnarøki sum heild má ikki fara upp um 0,3. | | Byggistigið skal fyri eitt natúrligt avmarkað øki ikki fara upp um 0,5 |
| Eingi hús ella einstakir partar teirra mugu vera hægri enn 8,5 m yvir miðaljørðildi. | | Hús skulu ikki vera hægri enn 8,5 m til hægsta punkt við útvegg. |
| Bygging til vinnuendamál má ikki verða sett nærri byggjutrom enn 15 m ella nærri aðrari bygging enn 5 m. | | Bygging skal ikki verða sett nærri bryggjutromunum enn 12 m. |

gg: B1 øki kemur ístasðin fyri D og D1

# Byggisamtykt fyri Kirkjubø

## Ásetingar - áðrenn og aftaná broyting

| **Áðrenn broyting**<br>**C - Vinnuendamál** | **Áðrenn broyting**<br>**C1A - Vinnuendamál** | **Eftir broyting**<br>**B2 -Vinnuøki** |
|---|---|---|
| Økið verður lagt av til atvinnuvirki, t.e. Heilsøluhandlar, goymslur, verkstaðir og ídnað og til tænastuvirksemi í sambandi við tey, bilstøðlar o.t. | Øki verður lagt av til vinnuvirki, ið hevur við matvøruframleiðslu at gera og tænastuvirksemi, ið hevur samband við hetta. | Umráðisparturin verður lagdur til vinnuvirki, verksmiðjur og tílíkt og tænastuvirksemi, ið hava samband við hesi. |
| | | Virkini skulu kunn flokkast í umhvørvisflokkunum 2-4 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu. |
| Grundstykki skulu vera í minsta lagi 800 m2 til støddar. | | Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 800 m2. |
| | | Útstykking verður einans loyvd sambært útstykkingarætlan fyri eitt natúrligt avmarkað øki. |
| | | Byggistigið skal ikki fara upp um 0,5. |
| Nettonýtingarstigið má ikki fara upp um 0,5. | | Rúmmálið á húsinum skal ikki fara upp um 3 m3 fyri hvønn m2 av stykkinum. |
| Eingi hús ella einstakir partar teirra mugu vera hægri enn 8,5 m yvir miðaljørðildi. | | Hús skulu ikki verða hægri enn 10 m. |

gg: B2 øki kemur ístasðin fyri C og C1A

# Byggisamtykt fyri Kirkjubø

## Ásetingar - áðrenn og aftaná broyting

| Áðrenn broyting | Eftir broyting<br>C - miðstaðarbygging |
|---|---|
| | Umráðisparturin verður lagdur til miðstaðarbygging, stovnum, framsýningarhølum, samkomuhúsum, tónleikahøllum og øðrum mentanarligum stovnum og tílíkum, og til tænastuvirksemi, ið hevur samband við hesi. |
| | Bygging verður einans loyvd sambært eini byggiætlan, sum byggivaldið hevur góðkent fyri eitt natúrligt avmarkað øki. |
| | Byggistigið skal ikki fara upp um 0,25. |
| | Nýtslustgið skal ikki fara upp um 0,5. |

# Byggisamtykt fyri Kirkjubø

## Ásetingar - áðrenn og aftaná broyting

| **Áðrenn broyting**<br>**H - Frílendi** | **Áðrenn broyting**<br>**H1 - Friðað øki** | **Eftir broyting**<br>**D1 - Frílendi** |
|---|---|---|
| Frílendi, t.e. Bøur og lendi, sum ikki má byggjast á. Tað eru lendi, sum løgd eru av til varðveitingar av náttúru, fornminnum o.t. Og til at fríðka um bygdina og gera hana dámligari at búgva í. | Øki verður varðveitt av mentunar- og søguligum grundum, soleiðis sum fyriskipað er í lægtingslóg nr. 19 frá 16. september 1948, um friðan av fornminnum og bygningum. | Umráðisparturin verður lagdur til frílendi, t.e. Bøur og lendi, sum ikki má byggjast á. Tað eru lendi, sum løgd eru av til varðveitingar av náttúru, fornminnum o.t. Og til at fríðka um bygdina og gera hana dámligari at búgva í. |
| Á teim í 1. stk. fyrr nevndu økjum mugu bert verða gjørdir vegir, gøtur, bilstøðlar, vetingar garðar o.t. Á teimum einstøku økjunum kunnu verða reistir bygningar, sum skila til virðið á økinum. | | Útstykking má ikki fara fram. |
| Loyvi kann gevast til at byggja einstøk úthús sum eru neyðug fyri raksturin av garðsbrúkin, t.d. Seyðahús, og uppdyrkingarvegir kunnu gerast, tá nýtingarætlan er gjørd og góðkend fyri eitt náttúrligt avmarkað størri øki. | | |
| Útstykking má ikki fara fram. | | |

gg: D1 øki kemur ístasðin fyri H og H1

# Byggisamtykt fyri Kirkjubø

## Ásetingar - áðrenn og aftaná broyting

| **Áðrenn broyting**<br>**E - Almennir stovnar** | **Áðrenn broyting**<br>**F - Almenn frítíðarøki** | **Eftir broyting**<br>**D2 - almennir stovnar og mentan** |
|---|---|---|
| Øki verður lagt av til almennar stovnar, til undirvísing, heilsurøkt, mentanarlig og átrúnaðarlig endamál o.t. | Øki verður lagt av til ítróttarvøllir, spælipláss, útiverupláss o.t. | Umráðisparturin verður lagdur til almennar stovnar, undirvísing, ítrótt, mentanarlig endamál, heilsurøkt og tilíkt. |
| Innan fyri økispartarnar mugu bara verða gjørd slík virki ella hús, ið samsvara við endamálið hjá avvarðandi økispørtum og tænastuvirksemi, ið hava samband við tey. | Innan fyri økini mugu bara verða gjørd virki ella hús, ið samsvara við endamálið hjá avvarðandi økispørtum og tí tænastuvirksemi, ið hevur samband við tey. | |
| | Hús kunnu bara verða bygd eftir byggiæltan, sum bygdaráðið hevur góðkent fyri eitt náttúrliga avmarkað størri øki. | Bygging verður einans loyvd sambært eini byggiætlan, sum byggivaldið hevur góðkent fyri eitt natúrligt avmarkað øki. |
| | | Byggistigið skal fyri eitt natúrligt avmarkað øki ikki fara upp um 0,25 |
| Nettonýtingarstigið má ikki fara upp um 0,3. | | Nýtslustigið skal fyri eitt natúrligt avmarkað øki ikki fara upp um 0,5 |
| Hús kunnu bara verða bygd eftir eini byggiætlan, sum bygdaráðið hevur góðkent fyri eitt náttúrligt avmarkað øki. | Planting av runnum og trævøkstri kann bert fara fram eftir góðkendari plantingarætlan. | |

## Byggisamtykt fyri Kirkjubø

## Ásetingar - áðrenn og aftaná broyting

| **Áðrenn broyting**<br>**G - Neyst og bátapláss** | **Eftir broyting**<br>**E - Neyst** |
|---|---|
| Øki verður lagt av til neystabygging og pláss at seta bátar á. | Umráðisparturin verður lagdur til neystabygging, sum lutvíst kann innrættast til frítíðarhús, og smábáta-, frítíðar og ítróttarvirksemi, ið hevur við sjógvin at gera. |
| Neyst mugu ikki verða bygd í meira enn einari hædd og ikki vera breiðari enn 4,0 m og hægri enn 4,5 m til mønuna, mált frá lægsta jørðildi. Neyst skulu hava mønu, og skal hon vera í miðjuni, og takhallið skal vera 41,5 gradir. Bygdaráðið kann tó víkja frá hesum ásetingum, sum serlig byggiætlan verður gjørd fyri alt ella stóran samanhangandi part av neystaøkinum. | Neystini skulu ikki vera hægri enn 5 m til hægsta punkt við útvegg og 7 m til mønuna. |
| Á bátaplássinum er einans loyvt at byggja hús, ið neyðug eru til raksturin, t.d. Amboðshús. | Neyst skulu hava mønu, ið skal vera í miðjuni, og takhallið skal vera millum 35-50 stig – tó helst "triðingsreyst (uml- 42 stig). |
| | Neyst skulu vera samanbygd við skjøldri móti sjónum. Neyðugar gøtur kunnu tó vera ímillum. |
| | Treytin fyri at loyva frítíðarhúsi í neysti er, at umstøður skulu vera at hava bát í neystinum og innrætting til frítíðarhús ikki er á niðastu hædd, umframt at nøktandi rýmingarmøguleikar eftir galdandi reglum skulu vera. |
| | Neyst, sum lutvíst verða innrættaði til frítíðarhús, skulu íbindast skipaða kloakk og aðrar neyðugara leiðingar. Útreiðslur hesum viðvíkjandi verða rindaðar av neyttaeigarum. |
| | Víkjast kann frá ásetingum í stk. 2 og 3 um serlig viðurskifti tala fyri tí, t.d. tá talan er um verandi bygging, sum er hægri, ella hevur ørðvísi snið enn ásett í byggisamtyktini. |

# Byggisamtykt fyri Kirkjubø

## Ásetingar - áðrenn og aftaná broyting

| **Áðrenn broyting** | **Eftir broyting**<br>**F - Frítíðarhús** |
|---|---|
| | Umráðisparturin verður lagdur til frítíðarøki, -hús og summarhús og tænastuvirksemi, ið hava samband við hesi. Húsini kunnu einans nýtast til frítíð og ikki virka sum fastur bústaður, arbeiðspláss e.t. |
| | Grundstykkini skulu vera millum 200-300 m2 |
| | Útstykking verður einans loyvd sambært útstykkingarætlan fyri eitt natúrligt avmarkað øki og byggjast skal sambært góðkendari byggiætlan. |
| | Byggistigið skal ikki fara upp um 0,3. |
| | Hús skulu einans verða bygd í einari hædd við nýttum lofti og ikki hægri enn 3 m til hægsta punkt við útvegg og 6 m til mønuna. |
| | Verða hús bygd við einvegis takhalli ella sløttum taki, skal tann lægra síðan ikki vera hægri enn 3 m til hægsta punkt við útvegg og tann hægra síðan ikki vera hægri enn 4,5 m til hægsta punkt við útvegg. |
| | Frítíðar- og summarhús skulu íbindast skipaða kloakk og aðrar neyðugar leiðingar. Útreiðslur hesum viðvíkjandi verða rindaðar av eigarunum. |

## Byggisamtykt fyri Kirkjubø

## Ásetingar - áðrenn og aftaná broyting

| **Áðrenn broyting**<br>**J - Bóndahús** | **Eftir broyting**<br>**G - Bóndahús** |
|---|---|
| Øki verður lagt av til bygging í sambandi við djórahald og jarðarbrúk, og bert er loyvt at hava eini sethús til hvørt festi. | Umráðisparturin verður lagdur til sethús í sambandi við djórahald og jarðarbrúk, og loyvt er bert at hava eini sethús til hvørt festi. |
| Sethúsini skulu annars lúka somu treytir, ið eru galdandi fyri øki B. | Stakhúsini skulu lúka somu treytir, ið eru galdandi fyri øki A. |
| Útstykking má ikki fara fram. | Útstykking má ikki fara fram. |

# Byggisamtykt fyri Kirkjubø

## Ásetingar - áðrenn og aftaná broyting

| **Áðrenn broyting**<br>**K - Landbúnaður** | **Eftir broyting**<br>**4. grundumráði** |
|---|---|
| Øki K er tað, sum eftir er av kommununi, tá ið frammanundan nevndu øki eru tikin frá, og verður tað nýtt til landbúnað, grótbrot, fiskaalistøðir o.a. | 4. grundumráði verður lagt til landbúnað og alment frílendi og tílíkt. |
| Loyvt er bert at byggja hús, ið eru neyðug til tess at tryggja fullgóðan rakstur av virkjum við teim endamálum, sum nevnd eru í stk. 1. Tó er loyvt at gera slík teknisk virki og hús, ið neyðug eru til ravmagns- og vatnveitingar, til burturveiting av skarnvatni og til telefon- og telegrafsamband og í sambandi við vegahal´d. | Loyvt verður einans at byggja fjós, úthús og annað, sum hevur við vanligt traða- og jarðarbrúk at gera.<br><br>Loyvt er at umvæla verandi sethús og byggja somikið afturat teimum, at tey eru hóskilig til nútímans nýtslu sum sethús.<br><br>Á jarðarstykkjum omanfyri 5.000 m2 er í mesta lagi loyvt at byggja 60 m2 í gólvvídd harav kunnu verða eini frítíðarhús í sjálvstøðugum bygningi, ið er í mesta lagi 30 m2 gólvvídd.<br><br>Á jarðarstykkjum undir 5.000 m2 er í mesta lagi loyvt at byggja 30 m2 gólvvídd, sum eisini kann vera frítíðarhús.<br><br>Loyvt er at gera byggingar, sum neyðugar eru fyri alment gagnligar veitingar. |
| Hús og teknisk virki skulu vera soleiðis til útsjóndar og setast soleiðis í lendinum, at tey lýta landslagið minst gjørligt. | Onnur bygging og virksemi, sum ikki hóskar seg at liggja í bygdum øki, kann staðsetast í 4. grundumráði. |
| Útstykking má ikki fara fram. | Øll bygging í 4. grundumráði sambært § 26, stk 2, litra d og e, skal gerast sambært serstakari byggisamtykt<br><br>Hús og onnur bygging skulu vera soleiðis vorðin og sett soleiðis í landslagið, at tey lýta sum minst.<br><br>Í sambandi við bygging í 4. grundumráði treytar kommunan sær rætt at seta krøv til skap og staðseting. |